

# Uttan Noreg og Russland hækkar oljuprísurin ikki

**Jógvan Hugo Gardar**

02.12.2015 - 12:51

Oljan.fo

Oljuprísurin sveiggjar nógv, og útlitini eru ikki fyri einum meir støðugum oljuprísi fyribils. Ábendingar eru um at prísurin heldur kemur at lækka, enn hækka.

Týski bankin Commerzbank sigur í eini feskari frágreiðing at ongi útlit eru til at tey oljuframleivandi londini í OPEC-felagsskapinum fara at minka um sína oljuframleiðslu, fyri at fáa javnvág í marknaðin aftur. Marknaðurin flýtur yvir av olju á goymslu, samstundis sum meir verður framleitt.

Commerzbank metir at ongin broyting hendir fyrrenn OPEC-londini tosa við Noreg og Russland um at fáa framleivsluna at minka. Noreg og Russland eru ikki limir í OPEC.